# Jøvn kapping við svia omaná

**Einans tvey stig skiltu vinnaran og aftasta telvaran í 4th Klaksvík International. Johan Eriksson vann fyri aðru ferð í Klaksvík, meðan Heini Olsen varð besti føroyingur við sínum 2. plássi**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Við úrslitunum í Klaksvík síggja vit eina góða útvikling í mun til hinar Klaksvík International kappingarnar. Fyrr hava føroyingarnir ikki blandað seg í oddastríðið eins væl. Nú er at kalla eingin munur millum okkara sterkastu og altjóða meistararnar. Vit hava telvarar við IM-styrki, men enn vanta seinastu normarnar. Bara í ár hava vit fingið tríggjar normar og tað prógvar at vit eru á rætta vegi.

4th Klaksvík International eydnaðist avbera væl. Fjølmiðlarnir bóru dagliga tíðindi um gongdina og tað er at fegnast um. Góðu og serligu umstøðurnar í Forminnissavninum, gav ein hugnaligan anda yvir kappingina. Talvini flest vóru eisini spennandi og vælleikt.



*Fram til tað seinasta var Heini Olsen partur av oddastríðnum. Men hann gjørdist akkurát ov stuttur, tá tað gjørdist til remis móti Jens Ove Fries úr Danmark*

### Normurin sum hvarv

Tá kappingin var komin í helvt eftir fimta umfar, sá tað lovandi út hjá Hans Kristiani Simonsen. Hann var saman við Johan Eriksson á odda við 3,5 stigum og normkravið áljóðandi 7 stig var avgjørt møguligt. Men stígur kom í og seinna helvt kastaði bert 1 stig av sær á Hans Kristian.

Hans Kristian tapti leikandi lætt á føroyingunum í seinnu helvt. Ávíkavist 26 og 12 leikir. Tað eigur sjálvsagt ikki at koma fyri tá ein jagstrar nomrar, men slíkt kann henda, eisini fyri tann besta.

Spell fyri Hans Kristian, at kappingin endaði soleiðis, men hóast illseinan endaróður, vinnur Hans Kristian sær eitt sindur av føroyskari rating. Altjóða ratingtal hansara er hægri enn tað føroyska og tí vinnur hann sær ikki nøkur sokallaði elo-ratingstig.

### Ziska mannaði seg upp

Flúgvandi í seinnu helvt var Helgi Dam Ziska. Eftir trý tap á rað og tveir javnleikir, telvaði hann seg heitan í seinnu helvt og vann sær trý stig og fekk sostatt 4 stig samanlagt. Eitt væla úrslit, sum eisini gevur fitt av rating til unga Ziskamannin. Hann fall als ikki í fátt, sum fleiri høvdu gjørt, eftir trý tap á rað.

Helgi prógvaði veruliga sínar dygdir í Klaksvík. Serliga kom tað til sjóndar, tá hann í í trýstum støðum fann effektivar verjuleikir, sum bjargaði honum javnleikir ímóti altjóða meistarunum. Sigurin á Heina og Hans Kristian bera eisini boð um, at Helgi skjótt verður at síggja í absolutta toppinum í føroyskari telving. Eftir kappingina hevur hann 2176 ratingstig og røkkur tað til 11. pláss á føroyska ratinglistanum. Reella styrkin hjá Helga liggur tó helst omanfyri 2300.

### Hálvt stig frá kappingarsigri

Heini Olsen stóð seg best av føroyingunum. Nærlagdur og væl fyrireikaður til talvini. Heini blandaði seg beinanvegin í oddastríðið og Eriksson og Hans Kristian kundu ongantíð kenna seg tryggar. Og tá Heini vann á Hans Kristiani í 8. umfari, varð tað hann sum bleiv besta føroyska kortið í seinastu umførunum.

Undan seinasta umfar var støðan tann, at Eriksson hevði 6 stig og Heini 5. Og tá Eirik Gullaksen vann á Eriksson, hevði Heina gyltan møguleikan at vinna kappingina, um hann vann sítt talv á Jens Ove Fries Nielsen. Men góða og djarva telvingin hjá Heina í einum fløktum og spennandi talvi, førdi tíverri bert til ein javnleik. Heini hevði eitt skiftið lovandi støðu, men sum sagt, so var talvið fløkt og tað var avgjørt eingin løtt uppgáva at vinna tað.

Johan Eriksson vann tí 4th Klaksvík International. Hann vann somuleiðis 2nd Klaksvík International í 2003. Hóast eina soltna seinnu helvt, varð 6 stig nóg mikið fyri svian. Gullaksen bardi seg upp á eitt deilt 2. pláss og tað er hann helst nøgdur við, tá vit hugsa um ringu fyrru helvt hansara. Vinnarin í fjør Jens Ove skuffaði við 4,5 stigum.

**Endaliga støðan í 4th Klaksvík International**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 IM Eriksson Johan | SWE | 2423 | 6.0 |
| 2 Olsen Heini | FAI | 2325 | 5.5 |
| 3 IM Gullaksen Eirik | NOR | 2382 | 5.5 |
| 4 Simonsen Hans Kristian | FAI | 2305 | 4.5 |
| 5 IM Fries-Nielsen Jens Ove | DEN | 2381 | 4.5 |
| 6 Ziska Helgi Dam | FAI | 2177 | 4.0 |

## Talvið hesa vikuna

Heini Olsen - Hans Kristian Simonsen
4th Klaksvik International (8), 22.09.2005

1.d4 d5 2.c4 e6 3.Rif3 c6 4.Ric3 Rif6 5.Bg5 Ribd7 6.cxd5 cxd5 7.e3 Bb4 8.Bd3 Fa5 9.Fc2 Rie4 10.0-0 Bxc3 11.bxc3 Rixg5 (Ikki er nøktandi at leika: 11...Rixc3?? 12.Rfc1 og Riddarin kann ikki flytast orsakað av Fxc8+!) 12.Rixg5 Rib6? (Í og so naivt. Rif6 er trygga og eisini besta svarið) 13.Bxh7 (Ja, hví ikki taka finnuna?) 13...Bd7? (Hans Kristian segði eftir talvið, at hann ikki sá framhaldið hjá Heina) 14.Bg6! fxg6 (Ikki nyttar at verja finnuna: 14...Rf8 15.Bxf7+! Rxf7 16.Fg6) 15.Fxg6+ Kd8 16.Rif7+ Kc7 17.Fg3+ Kc6 (Lítið hjálpir 17...Kc8 18.Nd6+ og svarta frúgvin verður søga) 18.Rie5+ (Støðan er vunnin hjá hvítum, men enn vantar nakað av arbeiði) 18...Kb5 19.Rfb1+ Ka6 20.Rid3 Fxc3 21.Ric5+ Ka5 22.Rixb7+ Ka6 23.Ric5+ Ka5 24.Fd6! Rhc8 25.a4! Bxa4 (Besta verjan hevði verið Bc6, men kortini er svarta støðan ikki at bjarga. Telduforritið Fritz 7 sigur frá greiðum hvítum fyrimuni)



DIAGRAM
Støðumynd eftir 25...Bxa4

26.Fxb6+! Og skák mát verður eftir 26...axb6 27.Rxa4++. Heini hevði eisini annan mátmøguleika: 26.Rxa4+ Rixa4 27.Rib7++ 1-0

# Gunnar vann einkultstartin

**Leygardagin gjørdist kappsúkklarin Gunnar Dahl-Olsen føroyameistari 30 km einkultstarti.**

SÚKKLING
*tíðindaskriv*

Við sgrinum leygardagin hevur Gunnar nú vunnið allar FM-kappingarnar, sum hava verið í ár. Fyrr í ár hevur hann eisini vunnið býarsúkkling og 100 km landavegasúkkling

Leygardagin vóru bæði startur og mál við plantusøluna í Hoyvík. Leiðin gekk til Kaldbaks og aftur á mál, í alt 30 km. Súkklarini vórur sendir avstað, ein og ein við einum minutti millum hvønn.

Tíðin hjá Gunnari var 43 minuttir og 58 sekund. Hetta er ikki nøkur sera góð tíð hjá Gunnari, grundin til at hann ikki súkklaði eins skjótt í ár sum undanfarnu ár, er helst at hann ikki kendi eins nógva kapping frá hinum súkklarunum í ár í mun til undanfarnu árini. Men einki skal takast frá Gunnari, tí hann vann so ruddiliga, munurin millum hann og nummar tvey vóru heilir fýra minuttir.

### Unglingar og teir gomlu

Hjá unglingunum gjørdist Torkil Veyhe føroyameistari, og nr. 2 var umleið 3 minuttir, og hann betraði sína tí frá 2004 við hálvum triðja minutti. Eisini Sigmund Olsson súkklaði ein góðan einkultstart og betraði eisini sína tíð frá 2004. So tað sæst stór framgongd hjá teimum ungu súkklarunum. Bergur Ingemarson bleiv nummar 3.

»Teir gomlu«, sigur onkur um motiónistarnar, men tað er helst eingin ivi um, at teir eru eins uppsettir at vinna á hvør øðrum, sum allir hinir orduligu kappsúkklararnir. Størsri munurin á teimum og restini er, at teir ikki takað tað so tungt, um tað ikki gongur teimum so væl í kappingini.

### Startrampa

Sum nakað nýtt var ein startrampa gjørd til kappingina. Hon er gjørd soleiðis at tað kemur eitt sindur av ferð á súkkluna beinanvegin tá súkklarin startar. Hetta er vanligt uttanlands, men fyrstu ferð at hetta er roynt í Føroyum.

### Úrslitini

**Elita:**
1 Gunnar Dahl-Olsen 00:43:58
2 Esmar Joensen 00:48:40
3 Høgni Øster 00:56:00

**Unglingar**
1 Torkil Veyhe 00:48:54
2 Sigmund Olsson 00:51:53
3 Bergur Ingemarsson 00:57:47

**Motión**
1 Sverri M. Edvinsson 00:50:47
2 Kjartan Eghólm 00:55:08
3 Kári Simonsen 00:56:55
3 Evald Rasmussen 00:56:55